## Mundi mist sjónina

Danski landsliðsmálverjin, Thomas Sørensen, var bara millimetrar frá at missa sjónina, tá hann saman við Stoke vann 2-1 í botndystinum móti Tottenham. Alan Hutton hjá Tottenham tveitti seg fyrilitarleyst móti danska málverjanum, og úrslitið gjørdist eitt stórt sár beint við høgra eyga. 20 stingir skuldu til, áðrenn sárið var seymað saman, og danski málverjin var ikki blíður eftir dystin. – Vit tosa ikki um eitt prus á beininum. Vit eru har, sum tað als ikki er stuttligt meira. Eg veit væl, at hann kom yvir at biðja um umbering, men tað fái eg ikki brúkt til nakað. Hatta var ein verulig beistagerð, segði Thomas Sørensen við danska Ekstra-Bladet eftir dystin.



## Stabæk liggur til gull

Stabæk liggur nú til at vinna norska meistaraheitið. Endaliga avgerðin er ikki fallin, men nú er tað bert ein teoretiskur spurningur, áðrenn Stabæk kann kalla seg meistari. Stabæk vann 2-1 um vikuskiftið, og nú tað mangla tvey umfør av norsku kappingini, skal nógv ganga galið, um Stabæk skal kiksa. Teir skulu tapa báðar teir seinastu dystirnar stórt, samstundis sum Fredrikstad skal vinna stórt.

# Jógvan Martin gjørdist víkingur

**Sum føroyskur landsliðsvenjari hevur Jógvan Martin Olsen mangan havt tørv á sama dirvi sum tí, ið víkingarnir plagdu at sýna. Nú er hann formliga eisini víkingur komandi tvey árini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í Víkingi gjørdu tey skjótt av, tá Jógvan Martin Olsen fyri trimum vikum síðani boðaði frá, at hann nú gavst sum føroyskur landsliðsvenjari.

Anton Skoradal hevði givið nevndini boð um, at hann ikki ynskti at halda fram sum høvuðsvenjari hjá Víkingi, og nevndin í felagnum setti seg alt fyri eitt í samband við nú fyrrverandi landsliðsvenjaran.



*Bara tveir dagar aftaná, at hann hevði leitt Føroyar í seinasta dystinum sum landsliðsvenjari, kundi Jógvan Martin Olsen staðfesta, at hann verður venjari hjá Víkingi komandi tvey árini*

*Mynd: Árant Hansen*

Samráðingarnar gingu bæði skjótt og væl, og seinnapartin fríggjadagin kundi Víkingur so bjóða til tíðindafund, har tað fyri væl møttu fjøldini, sum mundi telja eini 80 fólk, varð staðfest, at Jógvan Martin Olsen er nýggjur høvuðsvenjari hjá felagnum.

### Súni og Sámal

Brandur Jacobsen, sum er limur í bólkinum kring Formula-hópin hjá Víkingi, fegnaðist sum vera man um tvey-ára sáttmálan, sum nú er gjørdur.

Hartil staðfesti hann, at spælarahópurin til komandi kappingarár nú longu er um at vera komin upp á pláss. Allur hópurin, sum hevur spælt í ár, er til reiðar at taka eitt tørn afturat, og hartil verður talan møguliga um onkran einstakan spælara afturat, varð sagt.

Hvørjir spælarar kunnu koma upp á tal, varð ikki staðfest, men í øllum førum mundu tveir av gestunum í fyrrverandi LÍF-húsinum vekja forvitni.

Súni Olsen skal finna sær nýtt felag at spæla fyri, eftir at hann varð mest sum grýttur úr B36, og tað er á ongan hátt óhugsandi, at talan aftur verður um fótbólt í Sarpugerði hjá honum.

Og millum gestirnar var eisini Sámal Joensen. Hann hevur siglt við farmaskipi seinasta árið, men tað ljóðar, at hann møguliga hevur hug at koma á land aftur. Og fær hann aftur fast undir føturnar, er neyvan nakar ivi um loyalitetskenslu hansara, tá eitt felag skal veljast.

# Sulskis vann Klaksvík International 2008

**Stórmeistarin GM Sarunas Sulskis úr Litava gjørdist ovastur í talvkappingini Klaksvík International. Ovast seedaði Sulskis var á odda frá fyrsta til seinasta leik**

TALV
*Jógvan Joensen*
*jogvan@kallnet.fo*



*GM Sarunas Sulskis úr Litava gjørdist sigurharrin í talvkappingini Klaksvík International 2008*

*Mynd: www.faroechess.com*

Sarunas vann kappingina við 6½ stigi av 9 møguligum, meðan altjóða meistarin úr Danmørkini, IM Esben Lund deildi annað plássi saman við IM Tapani Sammalvu, úr Finlandi og GM Gawain Jones úr Onglandi, allir við 5½ stigi.

Føroyingarnir í kappingini stóðu seg sum heild sambært styrkismetingini, tó at Heini Olsen stóð seg nakað betri enn væntað varð frammanundan. Krútsterka kappingin gjørdist ein sonn avbjóðing hjá Føroyingum og samstundis sera góð upphiting til Talv-OL, sum verður í november mánað.

Hóast føroyingar ikki rukku nøkrum IM-normi á hesum sinni, er at frøðast um, at FM Daniel Semcesen úr Svøríki rakk sínum fyrsta IM-normi í Føroyum, eftir at hava verið nær við í fleiri umførum. Og sviar fegnast um frálíka úrslitið hjá Semcesen.

Annars gjørdist síðsta umfarið rættiliga friðarligt við 4 javnleikum og sigri til G. Jones ímóti Olaf Berg. Eftir at hava telvað í samfullar 8 dagar, uttan stórvegis møguleikar fyri at førka nevnivert við endaligu støðuna, samdust menn um at friðarligu loysnina.

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| GM Sarunas Sulkis (LTU) | 6,5 |
| IM Esben Lund (DEN) | 5,5 |
| IM Tapani Sammalvuo (FIN) | 5,5 |
| GM Gawain Jones (ENG) | 5,5 |
| GM Ralf Åkesson (SWE) | 5,0 |
| FM Daniel Semcesen (SWE) | 5,0 |
| Heini Olsen (FAI) | 4,0 |
| GM Miroslaw Grabarczyk (POL) | 4,0 |
| Martin Poulsen (FAI) | 2,5 |
| Olaf Berg (FAI) | 1,5 |

